## Avleiðingarnar av ferðsluvanlukkum breiða seg sum ringar í sjónum

Tá ið tosað verður um ferðsluvanlukkur, verður vanliga fyrst og fremst tosað um tey, sum farast. Men veruleikin er, at ferðsluvanlukkur ganga ikki bara út yvir ferðsluoffurið, tí at avleiðingarnar breiða seg sum ringar í sjónum. Hvørja ferð eitt fólk brádliga doyr av eini ferðsluvanlukku, eru tað fleiri fólk, ið verða álvarsliga rakt. Sjálvsagt verða tey nærmastu, t.d. foreldur, hjúnafelagar, gentan ella drongurin, systkin, ommur og abbar serliga hart rakt. Men eisini familja, vinir, skúlafelagar, arbeiðsfelagar og onnur verða merkt fyri lívið. Orsøkin er jú, at umframt at fáa skelk av ógvusligu hendingini, so missa tey uttan ávaring eitt fólk, sum hevði stóran týdning fyri tey.

Ferðsluvanlukkur raka eisini fólk, sum als ikki kenna ferðsluoffurið sjálvt. Tað var bara tilvildin sum gjørdi, at tey t.d. vóru nær hjá, tá ið vanlukkan hendi. Og er talan er um, at eitt ávíst fólk var atvoldin til at ferðsluvanlukkan hendi, er tað sjálvsagt, at hetta fær stóra ávirkan á lívið hjá viðkomandi eftir tað.

Nógv koma so dánt fyri seg aftur eftir skelkin, hóast at tey ongantíð gloyma. Men nógv eru eisini, sum skulu hava langa tíð at fáa dagin at vera bara nøkulunda vanligan aftur. Men summi koma ongantíð í rættlag aftur og vera m.a. óarbeiðsfør og merkt av tunglyndi.

# Nullhugsjónin og hvat so?

**– viðmerking í sambandi við Minningardag teirra deyðu í ferðsluni sunnudagin 4. juli 2004**

Minningardagurin í ár er hin fimti, sum verður hildin, síðani byrjað varð í 2000. Hesi fýra árini eru 14 fólk deyð í ferðsluni Føroyum, samstundis sum umleið 250 fólk eru skrásett hjá løgregluni at hava fingið skaða. Av teimum fjúrtan vóru tvey eldri enn 30 ár, tvey millum 25 og 30 ár og tíggju millum 17 og 22 ár.

### Nullhugsjónin

Í løgtinginum 13. apríl 2004 var aðalorðaskifti um Nullhugsjónina, sum miðar eftir:

- *at eingin skal doyggja ella fáa álvarsligt mein av ferðsluvanlukku í vegaflutningsskipanini,*
- *at alt virksemi, sum hevur við ferðslu at gera, skal vera í samljóði við hetta stavnhaldið."*

Tað var full undirtøka millum løgtingsmenn fyri Nullhugsjónini. Men, sum tað sæst, er enn langt á mál og skal nakað henda, mugu ítøkilig stig verða tikin, tað er ikki nóg mikið við føgrum orðum.

Løgtingið hevur enn eftir at samtykkja Nullhugsjónina, og at skipa fyri, at ein ferðslutrygdarætlan fyri tjóðina verður sett út í kortið.

Tað eru nógv mál, ið liggja á láni, men uttan iva eigur eitt tað fyrsta at vera at gera serligt royndarkoyrikort við tilhoyrandi víðkaðari útbúgving til tey ungu.

**Jón Kragesteen**
**dagligur leiðari,**
**Ferðslutrygd**




1) Deyð í miðal um árið pr. 5 undanfarnu ár
2) Mett gongd útfrá teimum 5 undanfarnu árunum, um eingi avgerandi tiltøk verða sett í verk
3) Í Nullhugsjónini verður sett sum mál, at í eitt 10 ára skeið, í 2014 skal talið av álvarsligum vanlukkum lækka í minsta lagi 40%. Við hesari gongd verður komið niður á Null í 20031

# Ferðsluhagtølini siga ikki allan sannleikan

**– sjúkrahústøl vanta!**

Tað er ein sannroynd, at veruliga talið á teimum, sum fáa skaða í ferðsluni er hægri, enn talið hjá løgregluni, tí tað eru ikki allir skaðar, sum verða meldaðir til løgregluna. Tað er tíverri so, at tað enn ikki er atkomandi til tølini hjá sjúkrahúsverkinum yvir skadd, hvussu nógv eru álvarsliga skadd, hvussu nógv eru minni skadd o.s.fr.

Fyri at fáa eina hóming av støðuni, kunnu vit tó nýta útrokningarháttin hjá Høgna Debes Joensen landslækna, sum sigur, at fyri hvørt fólk, sum doyr í ferðsluni, vera eini 25 fólk skadd, og av hesum fáa um 10% álvarsligt mein. Soleiðis kunnu vit rokna, at um 400 fólk eru komin til skaða í ferðsluni síðani Minningardagur teirra deyðu í ferðsluni var fyrstu ferð í 2000. Harav fingu um 40 fólk álvarsligt varandi mein.

Siga vit at, umstøðurnar í ferðsluni næstu fimm árini vera tær somu, sum tær hava verið seinastu árini kunnu vit vera bangin fyri, at tá ið 10. Minningardagur teirra deyðu verður hildin, hava 20 fólk afturat hava látið lív í ferðsluni. Av hesum verða eini fimtan/sekstan í aldrinum 17 til 22 ár! Eini 500 verða fólk skadd og um 50 av teimum fáa álvarsligt mein.

Hetta eru ræðandi tøl, men veruleikin!

Tí hevur tað skund, at samtykkja Nullhugsjónina, soleiðis at vit fáa eina ferðslutrygdarætlan fyri Føroyar við greiðum málsetningi

Talvan yvir skadd, álvarsliga skadd og deyð 1994 til 2003 og meting 2004 til 2009

**Talvan yvir skadd, álvarsliga skadd og deyð 1994 til 2003 og meting 2004 til 2009**



# 115 ár fara í søguna

**Í heyst letur handilin, Niðri á Møl, í Skálavík aftur. – Jú eg fari at sakna handilin nógv. Tað verður ómetaliga løgið hjá mær at verða noyddur at keypa inn aðrastaðni enn í handlinum, sigur Bjarni Dalsgaard, eigari av 115 ára gamla handlinum**

KRAMBÚÐ LETUR AFTUR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Seinni í heyst letur handilin, Niðri á Møl, í Skálavík aftur. Handilin er 115 ára gamal, og ein varðið í Skálavíkar søgu. Síðan 1889 hevur Dalsgaard-familjan rikið handilin. Tað var abbi núverandi eigaran, Bjarna Dalsgaard, ið fór undir handilsvirksemi í Skálavík fyri 115 árum síðan. Núverandi eigarin hevur knýttur at handlinum seinastu 35 árini.

– Tað er ein sannroynd, at tørvurin fyri handilinum ikki er hin sami longur. Fólkatalið er nógv minkað, og fáar ungar familjur leggjast afturat í bygdini. Tað ávirkar eisini søluna nógv, at fólk hava bil og kunnu tí lætt ferðast til aðrar bygdir á oynni ella fara av oynni at keypa inn, sigur Bjarni Dalsgaard.



### Løgið

Bjarni Dalsgaard dylir ikki fyri, at tað er ein løgin kensla, nú familjufyritøkan stendur á gáttini til at lata aftur.

– Jú eg fari at sakna handilin nógv. Tað verður ómetaliga løgið hjá mær at verður noyddur at keypa inn aðrastaðni enn í handilinum, greiðir hann frá.

Spurdur, um fjórða ættarliðið ikki hevur áhugað í handilinum, svarar Bjarni, at persónliga hevur hann ongantíð havt feriu, umframt at flestu leygardagarnir fara við handilinum, og hesum lívi sýnir unga ættarliðið ongan áhuga fyri.

### Burtur við

Bjarni Dalsgaard heldur lítið um núverandi prískapping. Hann heldur, at kappingin er burtur úr vón og viti. Hann nevnir gerandisvørurnar sum kaffi og døgurðamat, sum flestu handlar eru noyddir at selja uttan nakran vinning.

– Prískappingin er vitleys. Ber ikki til at selja gerandisvørur uttan vinning, sigur tað seg sjálvt, at tað verður torført at reka ein handil. Tað er drepandi fyri handlarnar, at hesar vørur altíð verða seldar fyri tilboðsprís, heldur hann

### Ikki tómhentur

Umframt handil, hevur bygningurin Niðri á Møl rúma posthúsi og rúsdrekkasølu. Bjarni Dalsgaard er leiðari á Rúsdrekkasølu Landsins á Sandoynni, og henda leiklut heldur hann fram at røkja, tá handilin letur aftur í heyst. Hann er eisini umboðsmaður hjá Føroya Bjór á Sandoynni og hesum fer hann eisini at halda fram við.



# Kommunusamanlegging undirskrivað

**Sørvágs Kommuna og Bíggjar Sóknar Kommuna verða ein kommuna frá 1. januar 2005. Sáttmálin um samanleggingina varð undirskrivaður í Tindhólmi hóskvøldið**



*Borgarstjóranir í Sørvági og Bø skrivaðu fyrstir undir sáttmálan um kommunusamanleggingina. Síðan skrivaðu allir hinir bygdarráðslimirnir í báðum kommununum undir*
*Mynd: Edvard Joensen*

KOMMUNU-SAMANLEGGING
*Edvard Joensen*

**Í Tindhólmi:**
So er tað endaliga staðfest, at tað verða tríggjar kommunur í Vágum frá 1. januar 2005. Sáttmálin um at leggja Sørvágs Kommunu og Bíggja Sóknar Kommunu saman, varð undirskrivðaður í Tindhólmi tann 1. juli.

Nýggja kommunan fer at eita Sørvágs Kommuna og fevnir um alt øki uttan fyri fossarnar, sum renna úr Sørvágsvatni og Fjallavatni. Bøsdalafoss fyri sunnan og Reipsáfoss fyri norðan. Tað verða sjey limir í nýggja bygdarráðnum. Tað eru tríggir færri, enn tað eru í báðum bygdarráðunum í dag.

Eina 84 merkur verður nýggja kommunan, roknaði onkur út í Tindhólmi hetta kvøldið. Og teir, sum morgírigastir vóru, funnu beinanveg útav, at um nú Mykines eisini var við, hevði hetta ivaleyst verðið størsta markatalskommunan í landinum.Tó fekst hetta ikki váttað soleiðis upp á standandi fót.

Arbeitt hevur verið við hesi samanleggingini í eini tvey ár ella so, segði borgarstjórin í Bíggjar Sóknar Kommunu, Jógvan Páll Joensen, eftir at undirskrivað var. Málið hevur verið til fólkaatkvøðu í Bø og Gásadali, har ein meiriluti samtykti at leggja saman. Mikukvøldið var bygdarráðsfundur um málið, har bygdarráðið einmælt samtykti samanlegginina, og so var bert eftir at skriva undir. Gjørt varð av at skriva undir í Tindhólmi.

– Hetta er symbolskt, greiðir Jógvan Páll Joensen frá. Hoyvíkingar áttu Tindhólm í gomlum døgum, men vágamenn vildu hava hann vestur. Tí tóku sørvingar og bíggjarmenn seg saman um at keypa hann aftur. Hetta samstarv bar frukt, og vit vóna somuleiðis, at hetta nýggja samstarvið millum sørvingar og bíggjarfólk fer at verða fruktargott. So hildið varð, at tað var rætt at byrja júst í Tindhólmi.

At báðir borgarstjórarnir, sum skrivaðu undir samanleggingina í Tindhólmi hóskvøldið, vóna, at hildið verður fram við samanlegging í Vágum, duldu teir ikki fyri á samkomuni, sum var í samband við undirskrivingina.

Bæði Eivin Jacobsen og Jógvan Páll Joensen mæltu hinum báðum kommununum í oynni, Miðvágs og Sandavágs kommunum, til at hugsa álvarsliga um møguleikan at gera allar Vágar til eina stóra kommunu.

Eisini umboðini fyri Sandavágs kommunu og Felagskommununa í Vágum, sum vóru gestir á hátíðarhaldinum í Tindhólmi, søgdu við Sosialin, at tey halda tað vera rætt at taka málið upp og viðgera tað í álvara. Tey løgdu tó dent á, at tað verður eingin avgerð tikin í hesum valskeiðnum, sum er úti á nýggjárinum. Men tað er rætt at taka málið upp í samband við komandi kommunuval, eru kommunalpolitikarar í Vágum samdir um.



*Tvey hugnalig hús eru í Tindhólmi. Skrivað varð undir í gamla húsinum. Aftan á varð farið niðan í nýggja húsið í Tindhólmi, har stutt borðhald varð*
*Mynd: Edvard Joensen*

# Til Íslands við snellu

**Snellubátarnir eru farnir til Íslands teir upsanum, teir eiga har yviri. Eisini onkur av teimum smærru heldur seg framat**

FISKIVINNA
*Edvard Joensen*

**Vágar:**
Snellubátarnir eru farnir ella eru við at fara til Íslands eftir upsanum í summar.

Frá onkrum, sum er har yviri, frættist, at hóast veðrið hevur verið heldur ólagaligt onkran av seinnu døgunum, er fiskiskapurin ikki heilt av lagið kortini. Onkran seinnapart er onkur teirra komin upp í eini 13.000 pund av upsa, siga teir frá.

Ein av bátunum, sum hevur Íslandsloyvi, er 20 tonsarin Oddbjørg, sum nýliga varð seldur úr Skopun til Sandavágs.

Hósdagin vóru teir á Miðvági eftir ísi og ætlaðu so beinleiðis til Íslands, greiðir Eisenberg Hansen, skipari, frá.

Teir hava verið á Bankanum, nú áðrenn farið verður til Íslands, men har royndist einki serligt, sigur Eisenberg.

Teir eru tríggir mans við, men tá teir koma til Íslands, fáa teir tveir mans afturat umborð, sigur hann.

– Hetta eru tó mestsum turistar, flennir hann. Leiðarin á sjómansheiminum í Reykjavík, sum er fyrrverandi eigari av Oddbjørg, og ein annar, sum so fegnir vilja sleppa ein túr. Og tað sleppa teir so, sigur Eisenberg, sum leggur afturat, at teir ætla at landa har yviri. Kvotan er ikki so stór.

Tað er partafelagið Fossá í Sandavági, um hevur keypt Oddbjørg úr Skopun. Fossá eigur fremmanundan línuskipið Venus, og hann hevur nú fingið partar av fiskiloyvinum hjá Oddbjørg. Nevniliga línudagarnar, soleiðis at Oddbjørg nú burtur av roynir við snellu.



*20 tonsarin Oddbjørg var hósdagin á Miðvági eftir ísi. Teir fara tríggir mans til Íslands við henni at royna eftir upsa*
*Mynd: Edvard Joensen*

# Vesturvón afturkomin

**Vesturvón kom aftur úr Barentshavinum hósdagin. Teir hava 690 tons av flaki inni, sum skipið er til Englands við um vikuskiftið**

FISKIVINNA
*Edvard Joensen*

**Sørvági:**
Vesturvón kom aftur úr Barentshavinum hósdagin. Teir hava fingið 690 tons, sum reiðarin metir hava eitt virði upp á einar 18-20 milliónir krónur.

Vesturvón skuldi fríggjakvøldið fara til Immingham at leggja upp, sigur Ólavur Petersen, reiðari. Hann sigur, at prísurin er hækkaður eitt sindur, síðan seinasta túr, og pundið stendur eisini væl, sigur hann.



*Vesturvón kom á Sørvág hósdagin við 690 tonsum av flaki, sum teir hava fingið í russiskum sjógvi. Veiðan verður løgd upp í Immingham*
*Mynd: Edvard Joensen*

Vesturvón hevur verið í russiskum sjógvi hendan túrin. Har eru umleið hálvtannaðhundrað tons eftir, sum teir ætla at fara eftir í heyst. Norska kvotan varð fiskað tann fyrra túrin, teir gjørdu í vár.

Hendan túrin hava teir verið knappar triggjar mánar burtur. Nú verður steðgað heima, meðan skipið fer til Englands og síðan verður gjørt klárt aftur.

– So hetta passar so frálíka væl, at nú fáa teir eisini Vestanstevnuna við, sigur Ólavur Petersen.

Næsta túr fer Vesturvón til Grønlands at fiska svartkalva, sigur reiðarin. Føroyingar eiga kvotu undir Vesturgrønlandi, og henni fara teir eftir. Eisini er ein royndarkvota eftir toski undir Eysturgrønlandi, og har ber eisini til at fiska eitt sindur av svartkalva afturvið.

Tað er býtt soleiðis, greiðir Ólavur Petersen frá, at Vesturvón vanliga plagar at sleppa til Grønlands eftir svartkalvanum, og hinir flakatrolararnir fara í Irmingarhavið, tá teir ikki eru eystanfyri.